

*– Eg kundi væl hugsað mær at vita, hvar avgerðin hjá landsstýrismanninum um at flyta enskt niður í 3. flokk kemur inn í tann yvirorðnaða málpolitikkin hjá Føroya Løgtingi, sigur Karin Jóhanna Knudsen, ensktlærari*

Ensktlærari rópar varskó:

# Øll verðin tosar ikki enskt

- Vit mugu ansa eftir, at vit ikki leypa framav í kjakinum um førleikarnar hjá føroyingum í enskum. Tað finnast til dømis ongi prógv um, at jú fyrr tú lærir eitt fremmandamál, jú betri fert tú at duga tað, sigur Karin Jóhanna Knudsen, ensktlærari

MÁLKJAK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Tað byrjaði við eini grein, sum stóð at lesa í bløðunum í heyst. Ein føroyingur, sum búði uttanlands, greiddi frá, hvussu dátt tað kom honum við, tá han varnaðist, hvussu illa hansara børn kláraðu seg í enskum í mun til hinar næmingarnar á altjóða skúlanum, tey gingu á. Søgan var eftir øllum at døma neistin, sum skuldi festa í eina tikkandi bumbu undir føroyska málkjakinum, og skjótt vistu aðrir útisetar líknandi søgur at fortelja. Orð sum "sjokk" hava staðið á breddanum, og summi vilja vera við, at tekur føroyska skúlaskipanin ikki annað skinn um bak, fara føroyingar at reika runt sum fremmandamálsligir analfabetar, afturúrsilgdir í altjóðageringini, meðan restin av heiminum ferð strúkandi inn í framtíðina.

Ikki kann sigast annað enn, at kjakið higartil hevur verið rættiliga einháttað og lítið fakligt. Og hetta fær nú Karin Jóhonnu Knudsen, lærara í enskum í Hoydølum, at ávara mótum einføldum og ov illa grundaðum niðurstøðum

– Eg ivist ikki í, at hesar søgurnar, hava rakað eitt eymt og kensluborið punkt hjá nógvum føroyingum. Annars hevði neyvan so mikið rumbul staðist av teimum. Trupulleikin er bara, at niðurstøðurnar í teimum byggja á vantandi vitan um mál- og málpolitikk í undirvísing, og tí má onkur rópa varskó, áðrenn skeivar málpolitiskar avgerðir verða tiknar, og tað kanska illa vendst aftur, sigur Karin Jóhanna

### Skeiv samanbering

Karin Jóhanna ger vart við, at fyri tað fyrsta er samanberingin við ensktførleikan hjá øðrum europeraum burturvið. Hesar tjóðir læra enskt sum 1. fremmandamál, meðan føroyingar læra enskt sum 2. fremmandamál umvegis eitt annað fremmandamál, nevniliga danskt. Tí er tað onki løgið í, at vit klára okkum verri í eini slíkari samanbering, sigur Karin Jóhanna, og leggur afturat, at higartil vita vit so gott um onki um, hvussu væl ella illa føroyingar klára seg í enskum í mun til aðrar tjóðir, sum eisini læra enskt sum 2. femmandamál.

– Ikki fyrr enn ein slík kanning er gjørd, og tað framvegis vísir seg, at okkara støði er lægri, gevur tað meining at hyggja at, hvat okkara skúlaskipan møguliga ger skeivt. Sum er, loysir tað ongan trupulleika í sær sjálvum at flyta enskfrálæruna niður í 3. flokk og als ikki, um enskt framvegis skal lærast umvegis danskt. Tað finnast nevniliga ongi prógv um, at jú fyrr frálæran í einum fremmandamáli byrjar, jú skjótari ella betri koma næmingarnir at duga tað, sigur Karin Jóhanna og vísir til eina nýggja kanning frá Baskaralandinum, sum vísir, at eldri næmingar sum heild læra skjótari eitt nýtt mál, enn teir yngru, meðan teir yngru kanska hava eitt sindur betri úttalu.

### Saknar grundgevingar

Tískil undrar tað Karin Jóhonnu, at landstýrismaðurin nú fer at leggja uppskot fram um at flyta enskfrálæruna úr 5. niður í 3. flokk, uttan at kunna nágreiniliga um, hvørjar grundgevingar avgerðin byggir á. Eftir ætlan skal nýggja skipanin koma í gildi longu komandi ár, men enn hevur lítið verið at frætt um, hvønn fakkunnleika landsstýrismaðurin hevur ráðført seg við, og í hvønn mun lagt er upp fyri teimum praktisku avleiðingum, ein slík broyting hevur við sær.

– Um avgerðin ikki byggir á annað enn vanliga páhaldið um, at jú fyrr tú lærir eitt fremmandamál, jú betri fert tú at duga tað, er tað also ikki eitt nóg haldgott grundarlag. Um ætlanin hinvegin er ein roynd at seta enskt í staðin fyri danskt, gevur hetta onga meining uttan so, at føroyskt frálærutilfar fæst til vega. Tað einasta vit við vissu vita í øllum hesum er nevniliga, at skjótasti og lættasti vegurin til at ogna sær nýggja vitan, og tað vil eisini siga fremmandmál, gongur gjøgnum móðurmálið. Sum er, fer so gott sum øll frálæra í enskum fram umvegis danskar læru- og orðabøkur. Hetta er í sær sjálvum ein forðan, sjálvt um flestu næmingar eru lutfallsliga stinnir í donskum, tá teir byrja við enskum í 5. flokki. Men endar ætlanin hjá landsstýrismanninum við, at 3. flokks næmingar skulu læra enskt um-